

## *Jona Henriksen um Javnstøðulógina:*

# Jesus gjørdi ikki mun á mann og kvinnu

*18 tinglimir samtyktu fríggjadagin at seta javnstøðulóginia í gildi. Ein samdur javnaðarflokkur og tjóðveldisflokkur atkvøddu fyri lógini, saman við tveimum limum í andstøðuni. Óvissan var stór eitt skifti henda dagin. Tingformaðurin tók málið av skránni fyrrapartin, m.a. tí mótmæli kom frá átrúnabólki*

Tað eydnaðist eftir tógvið stríð at fáa javnstøðulóg í Føroyum. Í fyrstu atløgu havnaði tingið uppskotinum í 1988, men tá hetta landsstýrið kom til í 1991, varð lógaruppskotið lagt fram av nýggjum. Tað fór í rættarnevndina, síðani í millumtinganevnd, sum nú eisini at enda fekk tað samtykt. Lisbeth L. Petersen úr Sambandsflokkinum og Birgir Danielsen úr Fólkaflokkinum atkvøddu fyri uppskotinum. Lasse Klein úr Sjálvstýrisflokkinum og Jógvan Sundstein úr Fólkaflokkinum, at kvøddu ikki við 3. viðgerð.

Fólk eru ógvuliga ósamd um javnstøðulógina í øllum flokkum.

Nøkur halda, at lógin stríðir móti kristnu læruni, og nógv sjónarmið og nakrar hugleiðingar hava verið frammi um tað. Onnur halda, at vit allar dagar hava havt javnstøðu, og at tað ikki er neyðugt at løggeva um slíkt.

### Mótstøðu í øllum flokkum

Helena Dam á Neystabø, formaður í rættarnevndini síðani á heysti í fjør, tók javnstøðulógina til viðgerðar. Arbeitt hevur verið við uppskotinum í einar fimm mánaðir. Roynt hevur verið at mýkja málið soleiðis, at tað við vissu kundi fáast meirluti fyri lógaruppskotinum.

Helena Dam á Neystabø heldur ikki, at hetta málið hevur verið meira trupult at arbeiða við enn onnur. Hon heldur eisini, at lógin er so breitt orðað, at tað eingin grund er fyri at vera bangin fyri henni.

Tað er heldur einki loyndarmál, at tað hevur verið serliga tíðarkrevjandi at sannføra tinglimir um at atkvøða fyri javnstøðulógini, og at tinglimir annaðhvørt hava játtað at atkvøða fyri, men so kortini hava sagt seg ivast í, um tað var rætt at fáa javnstø.ðulógina at virka í Føroyum.

- Slíkt lógaruppskot sum hetta hoyra til tey ávísu politisku málini, sum koma fram av og á, men sum møta mótstøðu í øllum flokkum.

- Vit hava frítt at tala og trúgva, og tað er so ymiskt, hvørja støðu fólk hava til slíkt. Tað havi eg onga viðmerking til, sigur Helena Dam á Neystabø.

### Týdning fyri grungevingina

- Javnstøðulógin ger onki hol í sjógv - soleiðis beinanvegin - men hon er so eitt framstig á leiðini at veita báðum kynum somu rættindi í samfelagnum og á arbeiðsmarknaðinum, sigur Helena Dam á Neystabø.

- Tað mest umráðandi í fyrstuni er at fáa lógina at virka. Hon fær ávirkan á nøkur kærumál, sum skilst liggja í landsstýrinum og bíða eftir at verða viðgjørd. Hetta verður helst uppgáva hjá Javnstøðunevndini at taka støðu til.

- Avgerðir hjá kærunevndini fáa ávirkan á, hvussu arbeiðsmarknaðurin frameftir skal virka fyri javnstøðu. Ivaleyst vil ongin arbeiðsgevari hava dóm fyri at skapa mismun millum kynini. Tað er ein týðandi grundgeving í sær sjálvum, sigur Helena á Neystabø.

Jona Henriksen var í síni tíð vil til at leggja uppskotið til javnstøðulóg fram á tingi, saman við Ingrid Sondum og Karini Kjølbro, tá tær tríggjar sótu á tingi.

### Jesu gjørdi ikki mun á mann og kvinnu

*- Hvat dámar tær javnstøðulógina?*

- Tað dámar mær væl, og tað skuldi eg helst eisini, av tí at eg var við til at leggja uppskotið fram í síni tíð.

*- Hvønn týdning heldur tú hon fær fyri eftirtíðina?*

- Eg haldi, at hon hevur nógv at týða t.d. við starvssetanum og nevndarsetanum.

- Fyri fáum árum síðani vóru tvey almenn størv sett, eitt fyri landið og eitt fyri kommununa, har javnstøðunevndin hevði verið hent, sigur Jona Henriksen.

- Eitt starv varð lýst leyst í Tórshavnar Kommunu, har bert ein umsøkjari hevði útbúgving, men hon kundi ikki fáa starvið, tí hon var kvinna.

- Hitt var hjá landinum, og har var ein kvinna, sum hevði útbúgving og eisini hevði verið á skeiðum, sum vóru neyðug fyri júst hetta starvið. Kvinnan fekk heldur ikki hetta starvið, men ein maður, sum eftir at hann varð settur í starv, fór burtur at fáa neyðugu útbúgvingina, upp á landsins besta.

*- Nógv halda, at lógin stríðir móti kristnu læruni?*

- Tað dugi eg ikki at skilja. Jesus gjørdi ikki mun á mann og kvinnu. Tað stóra í hesum var, at kvinnan kom við páskaboðskapinum.

- Longu í gamla Testamenti vóru eisini kvinnur, sum skarðu framúr. Eitt nú var Deborah dómari í Ísrael í 40 ár.

*Jona Henriksen var við til at leggja uppskotið til javnstøðulóg fram á tingi síni tíð. Hon heldur, at henda lógin er neyðug, og at hon forðar fyri at kvinnur við hollari útbúgving verða settar til viks fyri menn, sum ikki lúka treytirnar fyri at fáa ávíst starv*

- Tað verður eisini sagt, at tað ongantíð hevur verið munur millum mann og kvinnu í Føroyum, men um tað kemur til starvssetanir, so kann koma ein dagur, har menn eisini fáa brúk fyri javnstøðulógini. Tá kunnu teir kæra, um mismunur verður gjørdur móti teimum.

- Ongum nýtist at vera bangin fyri javnstøðulógini, sigur Jona Henriksen.

**Dagny**

# Nýggjur stýrislimur í ALS

Súsanna Danielsen, deildarstjóri í Tinganesi, hevur verið limur í stýrinum fyri Arbeiðsloysisskipanina.

Fríggjadagin segði hon seg úr stýrinumi. Jógvan K. Mørkøre er varaumboð í stýrinum, og hann tekur við eftir Súnonnu Danielsen.

Viðurskiftini viðvíkjandi ALS eru ikki fingin í rættlag. Útgjaldingardagur er í næstu viku, og av tí at lønardagur er áðrenn ta tíð, er møguliga nóg mikið av pengi í kassanum hjá ALS, verður upplýst í Tinganesi.

**Dagny**


## Tvangsauktion

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes

**Torsdag den 05. maj 1994, kl. 10.50**

tvangsauktion, (AS 66/94) over matr. nr. 216 O, Vestmanna, bygning på lejet grund, tilhørende P/F Tór Plast i konkurs.

Auktionen er begæret af advokat Bjørn á Heygum, J. Patursonargøta 3, Tórshavn, tlf. 1.1710 (j. nr. 940045) på vegne konkursboet.

Ejendommen er en erhvervsbygning på en 2828 kvm. stor grund.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på Dommerkontoret.

**Færøernes fogedret,** den 14.04.94
**Mette Søgaard-Nielsen**
dfm.